Veðrið

Fimm-daga-forsøgnin frá DMI

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Hvassur vindur ella skrið av vestri og vataslettingsella kavaælingur. Leygarnáttina hækkar hann upp í norðan og minkar vindin til friskan vind. Hitin um frostmarkið.



Veðrið leygardagin:
Fyrst friskt lot upp í ein strúk av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um frostmarkið. Út á dagin kemur hann av suðri og landsynningi og veksur vindin til hvassan vind. Hitin veksur upp í eini 5 stig og tað fer at regna.



Veðrið sunnudagin:
Friskt lot upp í ein strúk av útsynningi, skýggjað og regn ella ælingur av og á. Hitin millum 2 og 6 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Friskur vindur upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Seinni hækkar hann upp í vestan og veksur vindin til skrið ella storm. Hitin millum 2 og 6 stig.

Norska Saga og tað franska Total samstarva á Atlantsmóti

Jan Muller

Áhugin fyri at leita eftir olju og gassi á Atlantsmótinum tykist bara vaksa. Sohvørt tað nærkast nýggjum útbjóðingarumførum á bæði bretskum, írskum, norskum og eisini føroyskum øki, finna oljufeløg saman og skipa seg í samtøk. Hetta verður gjørt fyri at savna bæði vitan og peningaliga orku, nú stóru dýpini á hesum leiðum seta serstøk krøv til oljufeløgini.

Vit hava sæð hesa gongd vestan fyri Hetland og eru í løtuni vitni til líknandi gongd á føroyska økinum.

Í gjár varð upplýst, at norska oljufelagið Saga Petroleum og tað franska Total Petroleum hava skipað seg í eitt samarbeiði, sum hevur til endamál at leita eftir olju og gassi á leiðunum vestan fyri Hetland og vestan fyri Írland. Her verður serliga hugsað um at brúka felags royndir á djúpum vatni, sum feløgini eitt nú hava frá samarbeiði í norskum øki.

Talan er um eina fimm ára samstarvsavtalu. Avtalan kemur í lag eftir at Saga herfyri keypti upp stóra oljufelagið Santa Fe. Total, sum í dag stendur fyri fleiri av blokkunum vestan fyri Hetland, hevur ikki gjørt so nógv um seg á hesum økinum nú í eina tíð. Men nú samstarv er fingið í lag við Saga verður roknað við, at tað verður skundað undir leitingina vestan fyri Hetland og Írland.

Á skrivstovuni hjá Saga í Oslo verður sagt, at avtalan hevur einki við føroyska økið at gera. Saga arbeiðir framvegis við at finna sær samstarvspartnarar í einum komandi lisensumfari við Føroyar. Hvørvitt eitt samstarv kemur í lag við Total her eisini eru ongar viðmerkingar til.



Total er eitt av teimum stóru oljufeløgunum, sum hevur rættiliga nógvar blokkar tætt upp at føroyska markinum í Trance 8. Tað var annars Total, sum stóð fyri seismiskum kanningum við Føroyar nøkur ár herfyri. Felagið fekk lovvi til at halda fram við nøkrum linjum í lisensøki sínum 205 og víðari inn á føroyskt øki. Tað er annars ógreitt, um Total ætlar sær av vera við í einum lisensumfari á føroyskum øki.



Eitt lágtrýst í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing og dýpist og aftaná kemur kaldari luft við ælingi móti Føroyum.

Leygardagin verður ein hátrýstryggur yvir Føroyum við støðugari veðri, men aftaná koma nýggj lágtrýst vestaneftir.



Hitalagið malt frá 5/2 kl 06 – 6/2 kl 06. Hitin í gjár: 2,0°C
Minsti hiti máldur í februar: -11,0°. Hægsti hiti máldur í februar: 11,0°



Avfallið: 0,2 mm - malt frá 5/2 kl 06 – 6/2 kl 06

Hitalagið í gjár

Ilulisat	--
Nuuk	-10
Qaqortoq	-15
Ammassalik	-10
Saint John's	-11
Halifax	1
Reykjavík	-2
Seyðisfjørður	1
Torshavn	2
Lerwick	4
Aberdeen	4
London	7
Tromsø	-4
Bergen	2
Oslo	0
Stokkhólm	0
Keypmannahavn	4
Helsinki	-3
Moskva	-2
Berlin	2
Warzawa	2
Kiev	0
Bukarest	2
Paris	10
Madrid	10
Róm	--
Malorca	14
Athen	12
Malta	--
Tunis	16
Beijing	1
New Dehli	17
Bangkok	31
Jakarta	30
Sydney	26
New York	8
Miami	26
Los Angeles	14
Meksikobyur	16
Panama	--
La Paz	--
Rio de Janeiro	36
Buenos Aires	22

Kelda: DMI

Vestfalskyrrindi

7. februar: Tendring/Mánin næstur jørðini

	Suðuroyar-/Vágsfirði		Vestmanna-sundi		Nólsoyar-firði		Haraldssundi/Leirvíksfirði		Skúvoyarfirði/Skopunarfirði		Hestfirði/Sundalagnum	
	fl	fj	fl	fj	fl	fj	fl	fj	fl	fj	fl	fj
7. feb	0604	1831	0804	2031	0419	1646	0619	1846	0504	1731	0519	1746
8. feb	0659	1927	0859	2127	0514	1742	0714	1942	0559	1827	0614	1842
9. feb	0754	2022	0954	2222	0609	1837	0809	2037	0654	1922	0709	1937
10. feb	0848	2114	1048	2314	0703	1929	0903	2129	0748	2014	0803	2029

SÚKKLUR

JOHN W. THOMSEN
Box 10 · 700 Klaksvík
Tlf. 55858 · Fax 57878

Heroin funnið í Havn

Randi Jacobsen

Politið fann nú ein dagin eitt gramm av heroin í postinum úr Danmark.

Tað var ein dani, búsitandi í Føroyum, sum skuldi taka ímóti brævinum, men politið var fyrr.

Hetta var brúnt heroin, royki-heroin.

Tað er neyvan nógv til av hesum evninum í Føroyum.

Keypsprísurin fyri eitt gramm av heroin í Keypmannahavn liggur um 800 krónur. Uttan fyri Keypmannahavn kemur grammprísurin upp í 1600 krónur.

GRAV-STEINAR

Sera bíligir gravsteinar kunnu fáast við at venda sær til:
Tlf. 71345
ella **71687**